# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Stríðið ímóti víðgongdum islamistum kann taka 15 ár, og tað eiga vit at fyrireika okkum til*

*(Alan West, trygdarráðharri)*

# Margaret latin leys

**Trý ára gamla Margaret Hill, sum varð burturflutt seinasta hósdag, varð latin leys í gjárkvøldið**

Margaret Hill bleiv burturflutt, tá hon var á veg í skúla í nigeriska býnum Port Harcourt. Burturflytingar eru rættiliga vanligar í Nigeria, og tey bæði seinastu árini eru meiri enn 200 útlendskir oljuarbeiðsmenn burturfluttir. Í flestu førum eru teir slopnir leysir ímóti loysigjaldi.

Tað er tó sjáldan, at børn verða rænd, og sambært pápa Margaret, Mike Hill, sum er breti, fingu burturflytararnir heldur ongar pengar í loysigjaldi.

-Tað var trýstið frá fólkinum, sum gjørdi, at teir lótu Margaret leysa, segði Mike Hill við Sky News í gjárkvøldið. Hann segði, at burturflytararnir høvdu lata gentuna leysa í býnum Ogbakiri eftir avtalu við nigerisku trygdartænastuna. Nigerisku myndugleikarnir váttaðu seinni, at eingin er tikin í sambandi við burturflytingina.

Sambært Sky News høvdu burturflytararnir havt Margaret í einari smáttu einastaðni í skóginum.

Mamma Margaret, Oluchi Hill, sum er nigeri, segði í gjár, at burturflytararnir høvdu hótt við at beina fyri gentuni, fingu teir ikki loysigjald fyri hana.



*Margaret Hill*

# Sjáldsamt ferðalag til Ísraels

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð fara londini í Arabisku Samgonguni at senda umboð til Ísraels**

Á ferðini skulu tey arabisku umboðini tosa við ísraelskar myndugleikar um eitt arabiskt friðaruppskot, sum er ætlað at styrkja støðuna hjá palestinska forsetanum, Mahmoud Abbas, skrivar Reuters.

Harumframt skulu umboðini eisini umrøða, hvat skal gerast við Hamas og aðrar víðgongdar rørslur, sum hótta friðin í øllum Miðeystri.

Arabiska Samgongan og Ísrael hava verið fíggindar, men gongdin í seinastuni hevur gjørt, at partarnir eru komnir nærri hvør øðrum. Eitt nú stúra bæði Ísrael og tey 22 londini í Arabisku Samgonguni fyri, at víðgongdir islamistar fáa størri og størri ávirkan, og at Hamas hevur tikið ræðið í Gaza.

# Biðja irakar fáa sær vápn

Viðurskiftini í Irak eru nú so ótrygg, at leiðandi politikarar mæla fólki til at útvega sær vápn, so tey kunnu verja seg. Hetta vikuskiftið var eitt tað mest blóðuga nakrantíð, og sambært myndugleikunum doyðu meiri enn 220 fólk í ymsum atsóknum. Tann ringasta atsóknin var í býnum Amrili, har ein bumba kravdi umleið 150 mannalív. Útlendskir eygleiðarar siga, at støðan vísir, at iraksku trygdardeildirnar eru ikki førar fyri ar forða álopum á sivilfólkið.

## STUTT SAGT

### Ætlaði frá

Tony Blair ætlaði at leggja frá sær fyri fimm árum síðani, tí alt fleiri bretar vendu honum bakið. Tað segði fyrrverandi ráðgevin hjá Blair, Alastair Campbell, í gjár. Sambært Campbell skal Blair hava sagt, at hann ætlaði sær ikki at vera forsætisráðharri meiri enn tvey valskeið, og tí ætlaði hann at leggja frá sær. Fyrrverandi ráðgevin hjá Blair skrivaði dagbók, og hon er nú komin út sum bók við heitinum "Blairárini".

### Eingin fær grið

Í mong ár hevur tað verið siður í Fraklandi, at forsetin veitir nøkrum túsund fangum grið tjóðardagin 14. juli, men nú hevur Nicolas Sarkozy, forseti, kunngjørt, at soleiðis verður tað ikki í ár. Við blaðið Journal du Dimanche sigur forsetin, at hann hevur fingið áheitan um at kanna viðurskiftini hjá 3.000 av teimum 61.000 fangunum í Fraklandi. Men teir kunnu eins væl fyrireika seg til at verða verandi í fongsli, skrivar blaðið. Tjóðardagin í fjør veitti táverandi forsetin, Jacques Chirac, 3.500 fangum grið.

### Skifta gjaldoyra

Nú er so lítið skil á búskapinum í Zimbabwe, at myndugleikarnir ætla at sleppa landsins gjaldoyra, zimbabwiska dollaranum, og at brúka tann suðurafrikanska randin ístaðin fyri. Hann er frammanundan gjaldoyra í Namibia, Lesotho og Swazilandi umframt í Suðurafrikia. Gjaldoyraskiftið er partur av einari ætlan, sum skal bjarga búskapinum í Zimbabwe, har inflasjónin liggur um 5000 prosent, skrivar The Independent.